# Fjaldi lík í seks ár

Í amerikanska statinum Florida hevur ein kvinna í sekstiárunum fingið eitt árs fongsul fyri at hava fjalt líkið av mammu síni heima við hús í heili seks ár. Myndugleikar og trygging vistu einki um, at mamman var deyð, og hon fekk tí pensjón øll árini umframt pensjón hjá manninum, sum hevði arbeitt í herinum. Talan var um tilsamans 230.000 dollarar, sum dótturin so gjørdi sær dælt av, skrivar AP. Í rættinum gjørdi dómarin av, at kvinnan skal sita eitt ár í fongsli, og harafturat skal hon rinda hvønnj einasta dollara aftur - við rentum.



# Flýggja til Avstralia

Avstralska sjóverjan hevur tikið umleið 100 flóttafólk upp av einum skipi í Indiska Havinum. Alt fleiri flóttafólk royna at sleppa til Avstralia við báti ella skipi, og higartil í ár hevur avstralska sjóverjan steðgað 26 bátar og skip við umleið 1.400 flóttafólkum. Tey flestu flóttafólkini eru úr Irak, Sri Lanka, Afghanistan og Iran, men tey sleppa ikki í land í sjálvum Avstralia. Ístaðin fyri verða tey flutt til avstralsku oynna Christmas Island, sum er einar 1.400 fjórðingar úr avstralska meginlandinum, skrivar Reuters.






*Nýggi bygningurin hjá KBH er snøggur á at líta, og Helgi Johannessen sigur, at nú byggingin skuldi fremjast beint omanfyri bátahavnina í Oyrunum, hugsaði hann um, at bygningurin kundi hava okkurt sermerki. - Suðurendin er tí teknaður og bygdur í sniði sum stevnið á einum báti ella skipi, sigur hann*

árini, fyritøkan hevur verið virkin.

- Størsta einstaka byggjaríið er ivaleyst tey 24 sethúsini, vit í samtakinum Sp/f Vist hava bygt omanfyri Røktar-og Ellisheimið í Runavík. Vist er eitt samtak, sum KBH, Fuglø Arkitektar og Falkon eru saman um – Falkon sum entreprenørar og KBH sum byggifyritøka. Aftrat okkum trimum, sum eru saman um verkætlanina, hava so eisini verið aðrir undirveitarar.

Helgi sigur, at tey seinastu húsini av hesum 24 vórðu latin eigarunum í vár.

- Hesi húsini vórðu faktiskt øll seld, áðrenn byggingin byrjaði, og prísirnir vórðu avtalaðir. Vit vórðu tarnaðir nakað við eitt nú loyvum til lendið, men tey, ið skuldu hava hesi húsini, fingu tey uttan nakrar príshækkingar. Vit hava skilt, at fólk, sum heild eru fegin um hetta avrik, ið samtakið hevur gjørt.

Hann sigur, at húsini vórðu seld fyri millum slakar 800.000 krónur og upp í slakar 1,2 miljónir krónur fyri hvørt – alt eftir støðd. Tað vóru bæði yngri og eldri fólk, ið her ognaðu sær eini nýggj hús í góðum umhvørvi, har stutt er oman í miðbýin, og hagin kortini liggur beint við.

- Vit bygdu og seldu hesi 24 húsini fyri umleið 24 miljónirkrónur. Vinningurin gjørdist ikki tann stóri, men vit eru til reiðar at fremja eitt byggistig aftrat.

## 10 hús til sølu

Helgi Johannessen sigur, at pláss er fyri 23 húsum í 2. byggistigi, men í fyrstu syfti er ætlanin at byggja 10 hús aftrat, og hesi kunnu nú bíleggjast hjá Meklaranum í Saltangará.

- Vit vænta, at hol verður sett á 2. byggistig í vetur, leggur hann aftrat.

Hetta er soleiðis fyrstu ferð, at KBH hevur verið í so neyvum samstarvi um eina byggiverkætlan, men felagið hevur í aðrar mátar samstarv við aðrar fyritøkur, veitarar og undirveitarar.

Í 2002 varð apotekið í Runavík tikið í nýtslu og í 2004 eldrasambýlið á Toftum, sum KBH í báðum førum læt úr hondum.

- Millum onnur stór arbeiði, sum vit hava gjørt, er eisini virkisbygningurin hjá Zachariasi Leitistein á Rituvíkarhálsi og bilaverkstaðurin og bygningurin hjá BBR Service á Lambareiði, sigur Helgi.

## Eisini tað smáa

Eitt, sum sermerkir KBH, er, at felagið ongantíð hevur sagt nei til tey smáu arbeiðini, ið fólk hava tørv á at fáa gjørd.

- Vit siga ongantíð nei til at gera eitt arbeiði, tá fólk heita á okkum. Hava vit nógv um at vera, kann tað taka tíð, áðrenn vit kunnu koma. Vit søgdu heldur ikki nei, tá mest var at gera, og vit høvdu stórar verkætlanir at taka okkum av. Tíðir broytast, og tá kann vera gott, at vit eisini í góðu tíðunum góvu okkum stundir til tey smáu arbeiðini, ið kunnu hava stóran týdning fyri viðskiftafólkini og okkum sum fyritøku.

Helgi sigur, at 10 mans í løtuni eru knýttir at KBH-fyritøkuni, men tá mest var at gera, og byggingin av raðhúsunum í Runavík stóð upp á, vóru teir 15 í tali.

- Byggivirksemi er minkað, og nú er tað mest ymiskar umvælingar, ið fólk spyrja um. Tó er líkt til, at gongdin er við at broytast nakað og fólk, vit tosa við, eru ikki so svartskygd longur um sethúsabygging.

Hann sær eisini sína fyritøku sum eina tænastufyritøku, sum eigur at vera teimum til tænastu og hjálpar, ið hava brúk fyri at fáa ymiskt gjørt.

- Tað kann vera so lítið sum eitt rotið vindeyga – ella ein rútur, sum skal skiftast. Í slíkum føri er gott, at vit hava fólk knýtt at virkinum, sum kunnu átaka sær nógvar ymiskar uppgávur, smáar sum stórar, sigur Helgi Johannessen.

> *... vit eru eisini ein tænastufyritøka, sum eigur at vera teimum til hjálpar, ið hava brúk fyri at fáa ymiskt gjørt. Tað kann vera so lítið sum eitt rotið vindeyga – ella ein rútur, sum skal skiftast...*
>
> *Helgi Johannessen*